# ið buldraligt


*Uppgávan hjá Sigvardi er millum annað at syrgja fyri at farmurin kemur rætt fram til rætta stað. Her verður mjólk borin í land. Teir funnu tó skjótt út av, at henda mjólkakartongin skuldi til Fugloyar*

*Mynd: Høgni Thomsen*

- Er hann høgur í ættini, sleppa vit ikki norður um Svínoynna, soleiðis sum vit sluppu tað í dag.

- Tá fara vit suðurum og leggja tá at á víkini í Svínoy. Tað er í fínasta slag, sigur Sigvard.

Í Fugloy verður vanliga lagt at í báðum bygdunum, á Kirkju og í Hattarvík. Men heldur ikki her ber altíð til at leggja at á báðum støðum.

Skipanin er hon, at teir hava ein umboðsmann í oynni. Hann veit sum regul um, í hvørji bygd fólk skulu við Másanum.

- Hann fær tí skipað alt á bestan hátt, sigur hann.

## Buldraligir túrar

Sambært ferðaætlanini siglir Másin til Svínoyar og Fugloyar hvønn dag í viku. Ein ferðaætlan er fyri summarið og ein onnur fyri veturin.

Hóast Másin er eitt gott skip í sjónum, er tað als ikki dagført til krøvini í dag, millum annað tí at hann gongur nakað seint.

Serliga á vetrartíð veit manningin at siga frá nógvum ringum túrum um Fugloyarfjørð, har tað hevur brotið í bæði borð, um ein so kann siga.

Sigvard minnist onkran serliga ringan túr, har tunnur hava rikist á dekkinum og ferðafólk í hópatali hava spýð sum havhestar.

- Jú, slíkir túrar eru rættiliga buldraligir, greiðir Sigvard frá.

> *Vit sigla jú til brimpláss, og tí kunnu fólk ikki bara leypa avstað, tá tey halda tað vera best*
> *(Sigvard Johannesen, stýrimaður á Másanum)*

## Farleið í opnum havi

Másin byrjar túrar sínar í Hvannasundi og røkir rutusambandið hjá svínoyingum og fugloyingum.

Ein túrur til Svínoyar tekur 40 minuttir, síðani 20 minuttir til Kirkju og haðani 10 minuttir til hina bygdina í Fugloy, Hattarvík.

Frá 1. september verður siglt eftir vetrarskránni. Úr Hvannasundi verður farið dagliga kl. 8:45 og 14:45 tó við ávísum broytingum.

Undir skiftandi umstøðunum í Fugloyarfirði kunnu fráfaringartíðirnar vera skiftandi, alt eftir hvussu líkindini eru.


temp-team
VAL AV STARVSFÓLKI & VIKARUM



Kom og skráset teg

Kundi tú hugsað tær at arbeitt sum vikarur? Ella komið í eitt fast starv?

Vilt tú verða fleksibul og ráða yvir tíðini sjálv/ur?

Vit hava eisini brúk fyri pensionistum og lesandi.

Vit røkka um alt landið.

TEMP-TEAM er eitt vikarbureau.

TEMP-TEAM Føroyar er ein partur av fleiri deildum runt um í Europa og úti í heimi.

Okkara uppgáva er at finna starvsfólk, ið kunnu arbeiða sum vikarar og tey sum vilja koma í eitt fast starv, bæði á sjógvi og landi.

Far inn á heimasíðu okkara **www.temp-team.fo**

TEMP-TEAM, Niels Finsensgøta 37, FO-100 Tórshavn **Tel.: +298 61 61 00**



## Skipsstjórar til Smyril

Av tí at báðir skipararnir umborð á Smyrli gevast vegna aldur, verður hervið søkt eftir tveimum skipsstjórum til Smyril at byrja fyrst í novembur ella eftir nærri avtalu

**Starvið**
Skipsstjórin hevur leiðsluna og ábyrgdina av øllum virkseminum, sum fer fram umborð á Smyrli, herundir eisini starvsfólkamál.

**Høvuðsuppgávur**
- At tryggja at allar formligar ásetingar verða hildnar, herundir allar trygdarfyriskipanir
- At virka fyri mennandi arbeiðsumhvørvi og at tryggja, at trivnaðurin umborð er í hásæti
- At skipa fyri vikuligum fundum við manning og leiðslu umborð
- At virka sum bindilið millum høvuðsskrivstovu og skip
- At hava fíggjarligu ábyrgdina fyri rakstrinum og gera fíggjarætlan
- At tryggja eitt høgt, støðugt og mennandi tænastustøði
- At gera mánaðarligar rapporteringar um fólkaflutningsviðurskifti, virksemi og ætlanir
- At arbeiðssetningurin hjá fyritøkuni verður fylgdur

Talan er um eitt leiðarastarv innan føroyskan ferðafólkaflutning við spennandi avbjóðingum, har skipsstjórin fær ábyrgdina av størstu innanhýsis farleiðini í Føroyum. Viðkomandi kemur at seta sítt fingramerkið á tænastustøði umborð, og kemur sostatt at viðvirka til, at Strandfaraskip Landsins sum heild fær eitt positivt viðmæli, tá talan er um tænastu. Starvið gevur góðan møguleika fyri persónligari og fakligari menning.

**Førleikakrøv**
- Vinnubræv sum skipsførari
- Búskaparlig og analytisk evnir
- Góð leiðslu- og samstarvsevnir
- Skal kunna arbeiða málrættað
- Góðan telduførleika
- Væl fyri málsliga í føroyskum og enskum

Harafturat leita vit eftir einum persóni, ið hevur drúgvar royndir, er kreativur, nýhugsandi, róligur, upplýsandi og sum dugir væl við starvsfólki og ferðafólki.

**Lønarviðurskiftir- og setanartreytir**
Starvið verður lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Skipara- og Navigatørfelag. Mánaðarlønin (Endaløn) er í løtuni 32.687,- + eina viðbót á 8.214,- umframt ein eftirløn á 1634,-
Arbeiðstíðin er eitt til eitt, umframt feria.

**Umsóknir**
Umsókn við avritum skal sendast til:

Strandfaraskip Landsins
Att: Stjóraskrivstovan
Postboks 88
FO-110 Tórshavn

og skal vera fyritøkuni í hendi í seinasta lagi hósdagin 4. oktober 2007.
Nærri upplýsingar kunnu fáast við at venda sær til Regin Vágadal, stjóra, á tlf. 343012

STRANDFARASKIP LANDSINS

Strandfaraskip Landins (SSL) eru landsfyritøka undir Innlendismálaráðnum, hvørs endamál er at lúka landsins tørv á innanlands fólka- og farmaflutningi. Fyritøkan umsitur 29 farleiðir: 22 Bygdaleiðir og 7 Oyggjaleiðir. Samlaða talið av ferðafólkum við SSL í 2006 var 1,1 millión: 620 túsund við bussunum og 480 túsund við ferjunum. Talið av flutningsanleggum er 40 bussar, 8 ferjur og farmaflutningsútbúnaður. Starvsfólkini eru á leið 170 í tali, svarandi til 120 ársverk. Fyrisitingin á SSL er skipað í fimm deildir: Samferðslu-, Sjó-, Fíggjar-, Starvsfólka-, Farma- og cateringdeild.